# Deildarleiðari til Veðurstovu Føroya

Søkt verður eftir dugnaligum, ágrýtnum og framskygdum deildarleiðara at standa á odda fyri Veðurstovu Føroya.

**Ábyrgd og uppgávur**
Deildarleiðarin skal, saman við stjóranum á Vørn, mynda stovnin á ein sannførandi hátt og virka fyri at dagføra og menna stovnin, virka fyri góðum og mennandi arbeiðsumhvørvi, umframt at hava leiðsluábyrgd av starvsfólkum og øllum virkseminum á Veðurstovuni.

Høvuðsuppgávur eru m.a.:

- fyrisita og menna økið
- samskipa og fremja samstarv innan økið
- tryggja, at uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi og at fremja góðskuskipan viðvíkjandi mátingum og veðurforsøgnum
- tryggja, at bygnaður/mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv
- fremja og umsita sáttmálar og samstarvið við útlendskar veðurstovur, WMO og aðrar altjóða og millumtjóða stovnar

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni (Ph.d, MSc) innan náttúruvísindi, ella líknandi.

Aðrir førleikar sum dentur verður lagdur á:

- góðan kunnleika til økið, áræði og førleikar innan gransking og modellering
- førleika til at menna samstarvið við allar viðkomandi partar innan økið, vinnulívið og áhugabólkar
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- góð evni at samskifta og orða seg á føroyskum, enskum og norðurlendskum
- kann umsita og fyriskipa stórar granskingarverkætlanir og gera egnar granskingar

Leiðslu- og fyrisitingarligar royndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum, er ein fyrimunur.

**Løn og setanartreytir**
Setanar- og lønartreytir eru sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini. Tænastustaðurin er fyribils á veðurstøðini á Boðanesi, seinni verður starvsstaðurin ætlandi á flogvøllinum.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:

- Vørn, Yviri við Strond 3, postrúm 1238, 110 Tórshavn
- ella sum teldupostur til: journal@vorn.fo (viðheftar fílur skulu vera í PDF formati)

og skulu vera Vørn í hendi innan 11. oktober 2021 kl 1200. Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið, við at senda fyrispurning til formannin í Veðurmenningar-bólkinum, Rúnar Alix Rasmussen,
teldupostur: runar.alix.rasmussen@vedur.fo

**Um Veðurstovu Føroya:** https://www.vorn.fo/kunning/tidindi/vedurstova-foroya-veruleiki/